Dagf. 19. oktober 2021
HMR J. nr. 21/20697-6

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-053/2021 eftir § 52a í tingskipanini um serlækna í eldrasjúkum, frá Tordur Niclasen, løgtingsmanni

Fyrispurningurin er soljóðandi

1. Hvørjar royndir eru gjørdar fyri at fáa sett serlækna í eldrasjúkum og nær kann roknast við, at slíkur verður settur í heilsuverkinum?

Svar:

Landssjúkrahúsið hevur játtan til serlækna í eldrasjúkum (geriatri) í hálva tíð. Í 2015 varð ein serlækni við hesari sergrein settur á Landssjúkrahúsinum í nakrar mánaðir, men síðani hevur eingin serlækni í eldrasjúkum verið í starvi í Føroyum.

Tað er trupult at fáa serlæknar settar í fast starv, og geriatri er tíverri einki undantak - heldur hinvegin. Landsstýrismaðurin hevur fingið upplýst frá leiðsluni í Sjúkrahúsverkinum, at tey eru ikki vitandi um nakran føroying, ið er serlækni í eldrasjúkum, og tað hevur víst seg at verða nærum vónleyst at fáa nakran serlækna at søkja eitt yvirlæknastarv innan økið í Føroyum.

Landsstýrismaðurin er kunnaður um, at sjúkrahúsverkið fer at gera eina nýggja roynd í næstum, tá ið tey fara at lýsa eftir einum serlækna í eldrasjúkum.

Eisini hevur Medisinski depilin á Landssjúkrahúsinum verið í samskifti við Región Øst um at gerast partur av høvuðsútbúgvingarstørvum í geriatri, soleiðis at ein lækni kann byrja høvuðsútbúgvingina í geriatri á Landssjúkrahúsinum og gera seg lidnan í Danmark. Hesum er man ikki komin á mál við enn. Orsøkirnar eru fleiri, millum annað at tað í síni heild er trupult at fáa yngri læknar at velja sergreinina geriatri, og útlitini til at arbeiða sum einsamallur serlækni í eldrasjúkum í Føroyum eru ikki lokkandi. Soleiðis er í verandi støðu ikki møguligt at svara uppá, nær tað kann roknast við, at serlækni í eldrasjúkum verður settur í heilsuverkinum, men arbeitt verður við hesum.

Heilsumálaráðið, 19. oktober 2021

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður